## VEÐRIÐ




**Veðrið í morgin:**
Mest skýggjað og einstøk kavaæl. Gul til stívt andøvsgul av norðuri og landnyrðingi, seinni minkandi til lítið lot av ymsum øttum. Um náttina skýggjað og kanska kavi av og á. Gul til stívt andøvsgul av landsynningi. Hitin alt samdøgurið millum 0 og – 3 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fyrst skýggjað við møguleika fyri kava, seinni turt og sólglottar. Lítið lot av ymsum ættum, sum út á náttina veksur til lot til andøvsgul av útsynningi. Hitin um dagin millum 0 og -5 stig, um náttina um frostmarkið.




**Veðrið fríggjadagin:**
Skýggjað og eina løtu vátakavi ella regn. Gul til stívt andøvsgul av útsynningi, og hitin millum 2 og 5 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Skýggjað, men yvurhøvur turt. Gul til stívt andøvsgul av vestur og útsynningi, og hitin um 5 stig.

# Sagnir savnaðar á Snar

**TÍÐINDASKRIV**
*Føroya Skúlabókagrunnur*

Føroyskar sagnir eru nú savnaðar á Snar sum talgildur tekstur. Árni Dahl hevur við játtan frá mentamálaráðnum staðið fyri at talgildað sagnirnar, og í samráði við Føroya Skúlabókagrunn er gjørt av at leggja sagnirnar á Snar.

Higartil hava føroyskar sagnir at kalla bert verið til taks á prenti. Heilt fáar sagnir hava verið talgildar, og tær hava ligið spjaddar á ymsum heimasíðum. Nú verða so tær flestu kendu sagnirnar savnaðar á einum stað.

Serstøk síða er gjørd á Snar til sagnirnar. Vevbústaðurin er www.snar.fo/sagnir.

Í fyrsta umfari eru sagnirnar í "Sagnum og ævintýrum" hjá Jakobi Jakobsen lagdar á Snar. So við og við verða fleiri sagnir talgildaðar. Í næstum verða fleiri sagnir, sum V.U. Hammershaimb hevur savnað, lagdar út.

Sagnirnar eru bólkaðar í bygdir og býir. Á sagnaforsíðuni er eitt føroyakort, har til ber at trýsta seg inn á oynna ella øki, har bygdin ella býurin er. Oyggin ella økið gerst størri og kemur fram í skíggjan, og bygdirnar gerast sjónligar.

Hvør søgn hevur sína síðu. Á síðuni er søgnin sum alnetstekstur (htmltekstur), og eisini ber til at taka søgnina niður á pdf-fílu. Viðkomandi slóðir og tilfar verða knýtt at hvørjari søgn.



## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -4 |
| Nuuk | -2 |
| Qaqortoq | -4 |
| Ammassalik | 1 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | - |
| Reykjavík | 5 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | -- |
| London | 0 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 0 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -2 |
| Keypmannah. | 1 |
| Helsinki | -13 |
| Moskva | -18 |
| Berlin | -1 |
| Warzawa | -5 |
| Kiev | -14 |
| Bukarest | -4 |
| Paris | 1 |
| Madrid | 0 |
| Róm | 8 |
| Malorca | 10 |
| Athen | 15 |
| Malta | 14 |
| Tunis | 13 |
| Beijing | -3 |
| New Dehli | 21 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | -- |
| New York | 2 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | 15 |
| Panama | 32 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 22 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt: / Komandi nátt:




## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 03/01 kl. $06^{00}$ – 04/01 $06^{00}$. Hitin í gjár: -0,0°
Minsti hiti máldur í januar: -10,5° -
Mesti hiti máldur í januar: +13,7°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 03/01 kl. $06^{00}$ – 04/01 $06^{00}$.
Avfallið higartil í januar: 4 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

31. desember: Fullmáni
1. januar: Mánin næstur jørðini
3. januar: Jørðin næst sólini
7. januar: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 5. jan | 10:16 | 22:39 | 09:16 | 21:39 | 09:31 | 21:54 | - | 12:16 | 00:52 | 13:16 | 08:31 | 20:54 | 07:31 | 19:54 | 10:31 | 22:54 | 11:31 | 23:54 | 10:01 | 22:24 | 11:16 | 23:39 |
| 6. jan | 11:03 | 23:40 | 10:03 | 22:40 | 10:18 | 22:55 | 00:39 | 13:03 | 01:39 | 14:03 | 09:18 | 21:55 | 08:18 | 20:55 | 11:18 | 23:55 | - | 12:18 | 10:48 | 23:25 | - | 12:03 |
| 7. jan | - | 12:17 | 11:17 | 23:54 | 11:32 | - | 01:40 | 14:17 | 02:40 | 15:17 | 10:32 | 23:09 | 09:32 | 22:09 | - | 12:32 | 00:55 | 13:32 | - | 12:02 | 00:40 | 13:17 |
| 8. jan | 00:54 | 13:32 | - | 12:32 | 00:09 | 12:47 | 02:54 | 15:32 | 03:54 | 16:32 | 11:47 | - | 10:47 | 23:10 | 01:09 | 13:47 | 02:09 | 14:47 | 00:39 | 13:17 | 01:54 | 14:32 |
| 9. jan | 01:55 | 14:19 | 00:55 | 13:19 | 01:10 | 13:34 | 03:55 | 16:19 | 04:55 | 17:19 | 00:10 | 12:34 | 11:34 | 23:58 | 02:10 | 14:34 | 03:10 | 15:34 | 01:40 | 14:04 | 02:55 | 15:19 |